FYLGISKJAL 6

LM-050/2025

Hoyringssvar

Uppskot til Løgtingslóg um miðlastuðul (Miðlastuðulslógin)

Syðrugøta t. 8. oktober 2025

Vit takka fyri møguleikan at gera viðmerkingar til uppskotið um nýggja miðlastuðulslóg. Sum privatur tíðindamiðil, ið virkar á marknaðartreytum, síggja vit tað sum sera týdningarmikið, at lógaruppskotið leggur karmar, ið bæði tryggja fjølbroytni og javnræði millum almennar og privatar miðlar.

Við hesum skulu vit gerva okkara viðmerkingar til lógaruppskotið. Vit vænta, at hetta verður partur av hoyringsskrivunum, ið vera send Løgtinginum.

Rakstrarstuðul:

Vit fegnast um, at lógaruppskotið fevnir um nýggjar miðlapallar, eitt nú poddvarp. Tó eiga reglurnar um javnan tíðindastreym at verða tillagaðar hesum veruleika. Ein poddvarpsmiðil hevur ikki dagligan floym, men gevur út tilfar on-demand. Tí eigur tað at verða greitt, at eisini slíkar miðlar kunnu fáa stuðul, um teir hava regluliga og sjálvstøðuga framleiðslu.

Nógvur dentur verður í hesum upplegginum lagdur á at stuðulin skal veitast til journalistiskt tilfar, og at hetta skal viga nógv.

T.d. verður í § 1 víst til "tíðindamiðlar/netmiðlar", § 3 "Journalistiska framleiðslu", § 4 stk. 1 nr. 1 "Sjálvstøðugur tíðindamiðil við einum ábyrgdarhavandi redaktøri" og 4 stk. 1 nr. 4, "tíðindamiðil skal hava eitt redaksjonelt innihald innan eitt breitt evnisøki. Talan skal í høvuðsheitum vera um viðgerð av akutellum tíðindatilfari av politiskum, samfelagsligum og mentanarligum slagi..."

Týdningarmikið er at hetta verður sett í perspektiv, og at privatu miðlarnir ikki vera mettir órímiliga strangt.

Fyri at fáa perspektiv, so kann sigast at um vit hyggja í útvarps-skránna hjá KVF mánadagin 06.10.25, so er talan um uml 60 minuttir av tí, ið kann metast sum tíðindatilfar. Av teimum er vanliga ein týðandi partur endurgeving av tíðindaskrivum og øðrum tíðindamiðlum umframt at somu tíðindir ella partar av teimum vanliga vera endursend gjøgnum dagin. 1 tími er Breddin, har stórur partur er prát við gestir í studio, og so eru nakrar sendingar við mentan og ítrótti. Meginparturin av tí, ið verður sent hetta samdøgrið er sostatt neyvan at meta sum verandi innanfyri karmarnar av tí, her verður lagt upp til at privatu miðlarnir skulu kunna vísa at teir megna at framleiða til tess at livat upp til treytirnar.

KVF er nokk tann miðilin, sum vit mugu meta sum okkara fremsti og sterkasti tíðindaberi - og sæst longu her at tað er trupult og tungt at framleiða nógv tilfar dagliga, og hjá einum luftbornum miðli, sum sendur 24 tímar um samdøgrið, so verður høvuðsparturin tónleikur og meira leysar sendingar umframt endursendingar. Havast skal í huga her at loftbornu miðlarnir hava stórar útreiðslur av at gjalda fyri loyvi at spæla tónleik. Privatu miðlarnir mugu tískil metast útfrá hesum perspektivi og sjálvsagt vigast rímiligt mótvegis okkara almenna kringvarpi, sum helst verður mett sum útgangsstøði/benchmark.

Til § 4, og viðm. til hesa: Tosað verður um "redakjonell starvsfólk/ársverk". Tað er týdningarmikið at tað ikki verður kravt at hesi hava serstaka útbúgving ella fakligan limaskap, men at tað er tilfar og innihald, sum umræður.

Somuleiðis í §4 verður nevnt "mentanarligt tilfar". Vit halda at tað skal positivt viðmerkjast at ítróttur eisini kemur undir hetta.

Rás 2 spælir nógvan tónleik og tí fylla útreiðslur til rættindi nógv í roknskapinum. Onki verður nevnt um hetta, sjálvt um vit í Føroyum hava eitt sera ríkt tónleikalív, har loyvisgjøldini hjá miðlunum eru við til at tryggja føroyskari tónleika-mentan eina fasta inntøku.

Íverksetarastuðul:

Vit standa spyrjandi við hetta hugskotið. Hvat sprettur tað úr? Stuðulin skal latast einum nýggjum miðli, og kann latast í 5 ár. Hetta er fullkomiliga órimuligt hjá etableraðu miðlunum, og serliga miðlum sum eru settir á stovn seinastu 5 árini; at nýggir miðlar kunnu koma inn, og í roynd og veru yvirhála stovnsettar miðlar og fáa fyrimun av **ikki** at hava tikið stig til stovnan uttan møguleika fyri hesum stuðli. Vit standa generelt spyrjandi við hetta hugskotið og mæla frá.

Vit meta í fyrstu syftu **ikki** at hesin stuðulin er viðkomandi, tað finnast jú fleiri aðrir íverksetara-stuðuls-møguleikar, sum kunnu troytast!

Um hann verður veruleiki, sum vit staðiliga mæla frá, so má takast hædd fyri, at teir miðlar, sum stovnaðir eru seinastu 5 árini, eisini hava møguleika at søkja regress, ella í øllum førum søkja um hendan stuðulin fyrsta árið.

Miðlastuðulsnevndin:

Til § 7: Miðlastuðulenevndin skal vera meira umboðandi. Vit sakna eitt umboð frá privata vinnulívinum, ið eisini kann taka atlit til aðrar stuðulsskipanir og geografiska umboðan. Hesin perónur eigur eisini at vera forfólk.

Vit seta okkum eisini spyrjandi hvønn serkunnleika til íverksetan, tann til eina og hvørja tíð setta Miðlanevnd hevur.

Ein miðla/íverksetanarnevnd (nevnd sum arbeiðir við at stuðla, menna ella skipa fyri íverksetan) er ikki eitt formelt krav í lógini, men eitt ráð ella arbeiðsbólkur, sum kommunur, feløg ella stovnar ofta seta saman. Tí er tað upp til stovnin/kommununa at áseta, hvør situr har.

Vanliga roynir man at hava eina breiða umboðan í eini nevnd, ið skal taka støðu til íverksetan, soleiðis at nevndin fær bæði *vinnuligt, fíggjarligt og fakligt innlit*. Ein vanlig samanseting kann vera:

- Umboð fyri vinnuna – t.d. frá Vinnuhúsinum, handilsfeløgum, ella verandi íverksetarum.
- Umboð fyri kommunu ella land – politiskt ella umsitingarligt, fyri at tryggja samband við almennu skipanina.
- Fíggjarumboð – t.d. frá banka, grunnum ella stuðulsskipanum, ið kunnu ráðgeva um fígging.

- Menningar-/ráðgevarafeløg – fólk við royndum í verkætlanarmenning, strategi og marknaðarføring.
- Útbúgvingarstovnar – t.d. Fróðskaparsetrið, Glasir ella skeiðsmiðlar, sum kunnu stuðla við vitan og gransking.
- Serkønir innan rættarviðurskifti ella bókhald – so nevndin eisini kann vegleiða um lógarkrav, skatting o.a.
- Og í hesum føri, umboð fyri fjølmiðlar.

Tað týdningarmesta er, at nevndin hevur:

1. fólk við royndum sum íverksetarar,
2. fólk sum kunnu ráðgeva fíggjarliga og strategiskt,
3. fólk sum umboða almenna og lokala áhuga.

Til § 9 stk. 4: Svar eigur at fyriliggja í seinasta lagið ein mánaða eftir umsóknarfreist.

Samandráttur:

Vit mæla til eina skipan, sum tryggjar fjølbroytni og óheftar røddir í miðlaheiminum. Vit heita á Mentanarnevndina og landsstýrisfólkið um at endurskoða uppskotið við serligum atliti til:

- at treytirnar verða rímiliga tulkaðar í mun til støddd og fígging
- at rakstrarstuðul verður høvuðsparturin av skipanini
- at íverksetarastuðulin verður tikin úr uppskotinum ella, í minsta lagið umskipaður
- at Miðlastuðulsnevndin verður breiðari umboðað. Um talan verður um íverksetannarstuðul, skal Miðlastuðulsenevndin setast av nýggjum við røttum førleikum.
- at gjøgnumskygni og greiðar freistir verða tryggjaðar.

Vit ynskja sjálvandi at greiða Mentannarnevndini frá okkara sjónamiðum, um ynski er til tess.

Vónandi vera viðmerkingarnar tiknar í størsta álvara.

Vinaligast

Andrew Djurhuus, Stjóri

Rás 2 (virkandi undir felagnum ÍVF Granna-Geil)

Kontakt: ras2@ras2.fo / Tel. 222181